

Soleiðis brúki eg mínar
# PENGAR

**Eilen Anthoniussen**
eilen@sosialurin.fo



Sum lesandi á tveimum ymiskum útbúgvingum, er tað lestrarstuðulin, ið avgerð innkeypið hjá **ARNFRÍÐ LÜTZEN**. Tí er tað í Bónus at størsti parturin av innkeypinum fer fram, tí pengarnir skulu røkka sum longst, og merkir tað færri klæðir, heimaliting og shampoo á tilboð. Men tað verður ikki spart uppá góðar matvørur, og er fiskur altíð at finna í boksini. Og hann er frá Norðfra

**Myndir:** Jens Kr. Vang jensk@sosialurin.fo

Heima hjá Arnfríð Lützen í Havn, eru tey dagliga trý fólk í húsi. Umframt hana sjálva, húsast unnustin og sjey ára gamla dóttirin í íbúðini, meðan húsini í Kongsgili standa í gerð.

Arnfríð Lützen er 26 ára gomul, og gjørdist fyri nøkrum árum síðan eitt kent føroyskt navn, tá hon vísti hvat hon kundi við síni rødd. Seinnu árini hevur hon kortini hildið sera lágan profil. Og tað hevur sínar orsøkir.



Eg havi verið í Danmark og lisið. Eftir at hava roynt meg fram, havi eg endiliga funnið mína røttu hill. Eg elski at lesa á føroyskt á Føroyamálsdeildini. Tað er akkurát eg. Og saman við útbúgvingini til boligstylist, sum eg taki yvir netið, er tað bara perfekt, sigur hon.

Men at flyta aftur til Føroya fyri at lesa, merkir færri pengar á konto hvønn mánað, tí lítið fæst eyka fyri lesandi mammur, í mun til hvat ein lesandi mamma fær í Danmark.

Onkran mánað strammar tað eitt sindur meir í enn aðrar mánaðir. Men vit hava valt at klárað okkum við einari inntøku tað fyrsta árið, so eg kann savnað meg um lesturin, og tað hevur gingið fínt, sigur Arnfríð Lützen.

## Farvæl Hennes&Mauritz

At flyta aftur til Føroya merkir eisini at ein má siga farvæl við lagaligu keypsstøðini í Keypmannahavn. Eitt nú Hennes&Mauritz. Hennes&Mauritz er bara perfekt tá mann skal klára seg fyri lítið. So síðan eg flutti heim, havi eg ikki keypt nakað serligt. Síðan á jólum havi eg keypt mær eitt par av skóm, eitt par av buksum og tvær blusir, haldi eg.

Tað er lítið í mun til hvat hon fyrr keypti av klæðum. Nøkur av bestu pløggunum, Arnfríð hevur ognað sær, eru kortini ikki funnin inni í Hennes&Mauritz.

Nøkur av pløggunum, eg eri glaðast fyri, havi eg funnið í second hand handlum í Danmark. Eg havi ein grønan kjóla, sum eg keypti í einum second hand handli í Jyllandi eina ferð, sigur hon droymandi, og roynir at greiða frá hvussu kjólin sær út.

Í síðstuni hevur hon fingið sær til vana at seta seg við stokkunum, og roynir at læra seg at binda. Hon er í løtuni í holt við eina svarta troyggju til sín sjálvs.

- Og so eru tað húgvur. Eg elski húgvur. Eg havi einar 6-7 húgvur í ymsum litum, sum eg skifti í millum, sigur hon.

## Bónus er bíligast

Lítla familjan hjá Arnfríð er ikki ofta at finna á matstøðum í Havn.

Vit gera ofta mat sjálvi. Okkum báðum dámar væl at gera mat, og Uni er ein fantastiska góður kokkur. Hóast vit royna at skiftast, er tað sum oftast hann, sum ger mat.

Vanliga fara tey bæði eftir dóttrini, og so at keypa inn.

Vit fara altíð í Bónus at keypa inn. Tað er bíligast har. Men skulu vit hava okkurt serligt, enda vit ofta í Miklagarði, sum hevur størsta úrvalið. Tað er sum oftast um vikuskiftini, tá vit gera okkurt serligt.

Tað er tað vanliga, sum endar í innkeypsvogninum hjá Arnfríð Lützen. Í heila tikið vildi hon sagt, at tey eta rættiliga varierað heima.

Men fiskur skal vera í boksini. Tað hava vit fingið okkum til vana. Og fiskin bíleggja vit frá Norðfra. Frikadellurnar og flaki frá Norðfra eru sera góðar haldi eg, og yvirhøvur er tað góð góðska, ein keypir frá Norðfra.

Góðir vanar, sum at hava grønmeti á borðinum, hevur hon fingið sær. Men um tað er vistfrøðiligt, hevur ongan týdning.

## Onki skemmuinnbúgv

Hárið litar Arnfríð Lützen sjálv, og fruntin klippir og hampar hon eisini sjálv.



Seinast hon varð klipt, var hon heima hjá einum frisøri og gjørdi sær hárið. Tað var bíligari, og minst líka gott, sum var tað gjørt á eini salong. So tað skal hon gera aftur, hevur hon sett sær fyri.

Tveir heilt serstakir skápsmøblar standa inni í báðum stovunum hjá Arnfríð Lützen. Teir eru keyptir í einum handli á Amager, tætt við har hon búði í Keypmannahavn.

Teir kostaðu nógv. Men tá vit skuldu flyta heim, vistu vit at vit skuldu gjalda so nógv fyri flutningin, og avgjørdu tí at flyta okkurt, sum vit vóru glað fyri. Hesir eru gamlir kinesiskir møblar, sum eg eri ótrúliga glað fyri.

Eg orki ikki fyri Skemmumøblum, og eg havi ongantíð

Sosialurin